

*Heðin Zachariassen, borgarstjóri, ásannar, at tey 24 grundøkini, sum nú verða klár til útgrevstur í Hósvík, verða seld fyri minni enn tað, sum rópt verður kostprísur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# 24 nýggj grundøkir í Hósvík

**Sunda kommuna hevur keypt eitt umleið 16.000 fermetra stórt øki í Hósvík til útstykkingar, har pláss verður fyri tilsamans 70-80 sethúsum. 24 av hesum grundøkjum kunnu ætlandi gravast út eftir summarfrítíðina**

HÓSVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tilsamans 48 fólk standa á bíðilista til grundøki í Hósvík.

Sunda kommuna hevur leingi arbeitt við eini útstykkingarætlan í Hósvík, har neyðugt hevur verið við ognartøku av lendi.

Heðin Zachariassen, borgarstjóri, ásannar, at hetta hevur tikið sína tíð, men nú líður so væl við teimum fyrstu 24 grundøkjunum, at fólk, sum ogna sær hesi, kunnu byrja at grava út eftir summarfrítíðina, samstundis sum kommunan ger sítt arbeiði við lendinum liðugt.

- Vit hava keypt eitt øki til sethúsabygging, sum er umleið 16.000 fermetrar, og tað er av hesum lendinum, at tey fyrstu 24 grundøkini verða klár seinni í summar.

Hann metir, at pláss verður fyri umleið 70-80 sethúsum tilsamans á teimum 16.000 fermetrunum.

**Bílig grundøki**

Grundøkini, sum Sunda kommuna nú ger klár til útgrevstur í Hósvík, eru millum 500 og 600 fermetrar stór, og tey verða seld fyri 220 krónur fermeturin.

- Hetta merkir, at grundøkini koma at kosta einar 100.000 krónur, og tá er alt íroknað – vegur, lendi og íbindingar.

Borgarstjórin ásannar, at hesi 24 grundøkini verða seld fyri minni enn tað, sum rópt verður kostprísur.

Hann dugir ikki at síggja nakra meining í, at fólk, sum seta búgv, einsamøll skulu gjalda fyri eitt nú vegin, sum bygdur verður til økini.

- Ein slíkur vegur verður brúktur av almenninginum, og tí síggi eg onga meining í at leggja allan kostnaðin á tey, sum seta føtur undir egið borð.

**Ynskja tilflytarar**

Heðin Zachariassen sigur, at alt bygdaráðið í Sunda kommunu ynskir, at fólk vilja seta búgv í felags kommununi, og tí verður eisini nógv gjørt fyri at gera umstøðurnar so góðar sum gjørligt.

Hann vísir á, at nýggjur barnagarður varð tikin í nýtslu í Hósvík í 2005, har pláss er fyri 58 børnum, og annars er tørvurin á barnaansing í kommununi sum heild nøktaður.

- Vit hava ongan bíðilista og hava ongan bíðilista havt, síðan kommunurnar løgdu saman, sigur borgarstjórin.

Barnaansingin í Sunda kommunu kostar umleið 16 miljónir krónur brutto um árið, og tá inntøkurnar eru drignar frá, sum foreldrini gjalda fyri ansingina, er talið, sum kommunan rindar, umleið 12 miljónir krónur.

- Vit halda, at góð barnaansing er ein treyt fyri trivnaði og vøkstri í kommununi, so hetta er væl farin peningur, sigur Heðin Zachariassen.



*Stívliga 300 fólk búgva í Hósvík*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Sundalagið dregur nú fólk til sín

**- Eg var ikki tann heitasti, tá lagt varð saman í Sunda kommunu, men í dag er eingin ivi í mínari sál um, at hetta var tað rætta. Økið er ment á øllum økjum, sigur Heðin Zachariassen, borgarstjóri**

SUNDALAGIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Bygdirnar í Sunda kommunu eftir samanlegging 1. januar 2005 eru Hósvík, Hvalvík, Streymnes, Saksun, Langasandur, Haldarsvík, Tjørnuvík, Gjógv, Norðskáli, Oyrarbakki og Oyri.

Fólkatalið liggur beint niðan fyri 1600, og kommunan telist í dag millum tær, sum veksa skjótast í landinum.

Nógv sethúsabygging er í felags kommununi, og fleiri raðhús og dupulthús eru eisini bygd.

**Stór menning**

- Kommunan er ment á øllum økjum síðan samanleggingina. Eg var ikki tann heitasti fyri at leggja saman, men í dag er eingin ivi í mínari sál um, at hetta var tað rætta.

Heðin Zachariassen vísir á, at í dag er Sunda kommuna ein kommuna, sum fólk vita um og hava áhuga fyri.

- Hetta síggja vit ikki minst á teirri bygging, sum er farin fram í økinum seinastu árini.

Borgarstjórin ásannar, at nøkur viðurskifti kundu verið øðrvísi, men hann ásannar eisini, at nógv kundi verið verri, enn tað er í dag.

- Fyrr togaðust vit um somu ting í sama øki. Í dag kunnu vit raðfesta skilagóðar íløgur og verkætlanir, sum koma økinum til góðar, og við einari felags kommunu kunnu vit umgangast at gera fleiri dupultíløgur, sum hann tekur til.

**Fjølbroytt vinna**

Heðin Zachariassen fegnast um vinnulívið í Sunda kommunu, sum hann heldur er rættiliga fjølbroytt og tískil ikki so sárbart.

- Vit hava stór feløg, og vit hava smærri feløg, sum reka ymiskt vinnuligt virksemi. Vit hava eisini fiski-og útróðrarmenn í økinum.

Borgarstjórin heldur, at áður var Sundalagið eitt økið, tú bert koyrdi ígjøgnum á veg suður og norður.

- Nú er hetta eitt øki, sum dregur fólk til sín, bæði til búsetingar og vinnuligt virksemi, sigur Heðin Zachariassen.